

www.oljan.fo

**Jan Müller** 18 - 05 - 2013

# Statoil skjýtur seismikk við Føroyar

Í dag er norska seismikkskipið Artemis Atlantic komið í føroyskan sjógv, har tað skal skjóta seismikk fyri Statoil fram til 20. juni. Sum skilst eru hetta fyrireikingar til bæði boring og víðari kanningar av føroyska landgrunninum, har Statoil hevur fleiri loyvi. Út frá positionnunum fyri seismisku verkætlanini, ið eru at finna á heimasíðuni hjá MRCC, sæst, at talan er um kanningar á fleiri av loyvunum hjá Statoil, møguliga 011, 006, 008 og 016. Serstakliga áhugavert er at býta merki í, at kanningarnar eisini fevna um komandi boringina á Súlan/Stelku leitimiðinum, sum liggur heilt út móti markinum og bara fáar fjórðingar frá einum risastórum oljufundi hinumegin markið, Rosebank, sum Statoil eisini er partur av. Tað hevur ikki eydnast oljan.fo at fáa viðmerkingar frá hvørki Statoil og Jarðfeingi. Felagið Artemis Shipping eigur skipið, og Dolphin Geophysical rekur/chartrar skipið. Sum hjálparskip undir kanningunum í Føroyum verður bretska Fairline Surveyor brúkt. Seismikkskipið brúkar ein 5,4 fjórðingar langan kaðal til kanningarnar. Positiónirnar hjá skipinum komandi mánaðin eru hesar: 60.50N - 004.14 W 61.20N - 005.24 W 62.25N - 004.24 W 62.50N - 001.55 W Statoil stendur annars til at bora brunnar í næstu framtíð. Annar er framhald av Brugdan 2 og hin er brunnur, sum Statoil, Dong og OMV hava bundið seg til at bora. Aftrat hesum stendur Statoil fyri fleiri øðrum loyvum, sum higartil eru fevnd av kanningum. Seismisku kanningarnar á landgrunninum hava uttan iva samband við umrøddu loyvini, í hvussu er nøkur av teimum.